# Fiskidagaskipanin leggjast um: Hvør fiskidagur skal nú roknast út í tímum



*– Nú fiskidagarnir verða býttir sundur í tímar, verður neyðugt at skerja dagatalið fyri at forða fyri at veiðitrýstið økist. Annars verður fiskidagatalið neyvan skert komandi ár, so talan verður ikki um at minka veiðitrýstið, sum fiskifrøðingar hava skotið upp, sigur Hendrik Old, formaður í vinnunevndini*

**Afturfyri skal fiskidagatalið skerjast nokk so fitt komandi fiskiár fyri at veiðitrýstið ikki skal økjast.**

Fiskidagaskipanin
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal fiskidagaskipanin leggjast um. Afturfyri skal fiskidagatalið skerjast nokk so fitt. Tað er samgongan samd um.

Nýtt fiskiár byrjar 1. september og eitt tað fyrsta, sum Løgtingið fer at gera, nú nýggj tingseta byrjar á Ólavsøku, verður at áseta fiskidagatalið fyri komandi ár.

Sostatt er samgongan nú í ferð við at leggja síðstu hond á eitt uppskot um, hvussu fiskidagaskipanin skal vera næsta ár.

Uppskotið verður lagt fyri tingið beinanvegin á Ólavsøku.

Hendrik Old er formaður í vinnunevnd løgtingsins og hann er sostatt ein av fremstu talsmonnunum hjá samgonguni í fiskivinnumálum.

Hann sigur, at enn er samgongan ikki heilt liðug at viðgerða fiskidagatalið fyri næsta ár.

Men tað er semja um, at skipanin skal leggjast um, so at hvør fiskidagur nú skal roknast út í tímum.

Og tað heldur Hendrik Old ikki er annað enn rímiligt.

– Higartil hevur tað verið so, at hevur eitt skip verið úti í 25 tímar, missir tað tveir fiskidagar.

Tað heldur hann ikki er rætt.

– Tað merkir, at skip og bátar mugu gera sær stóran ómak at vera inni aftur fyri midnátt. Fyri línuskip og línubátar elvir tað til, at tey ikki fáa sett so nógv, tey vilja og tey mugu draga skjótari fyri at lukkast innaftur og tað darvar vinnuni.

Tí er samgongan samd um at broyta skipanina, so at allir leysir tímar skulu leggjast saman og ikki fyrrenn tað er komið upp á eitt samdøgur, skal tað telja fyri ein dag.

Formaðurin í vinnunevndini sigur, at hetta er ein skipan, sum kann fara at krevja nógv meiri umsitng við sær, men hann metir at samgongan fer at finna eina loysn, soleiðis at hetta letur seg umsita nóg smidliga.

### Økir veiðitrýstið

Hinvegin er tað eisini greitt, at hetta er ein skipan, sum fer at økja veiðitrýstið nokk so fitt.

– Tí er tað neyðugt at leggja upp fyri hesum í tí nýggja fiskiárinum, sigur Hendrik Old.

Hann sigur, at av tí sama verður neyðugt at skerja fiskidagatalið komandi ár nokk so fitt.

At umroknað hvønn fiskidag til tímar fer at raka teir ymsu skipabólkarnar ógvuliga ymiskt. Teir, sum gera stuttar túrar verða harðari raktir, enn teir, sum gera longri túrar.

Men tað er í øllum førum greitt, at sum heild skulu fiskidagarnir skerjast eini 7% - 8%, bara fyri at leggja upp fyri tí økta veiðitrýstinum.

So kann skerjingin verða eitt sindur ymisk frá skipabólki til skipabólk.

Men tað er heldur ikki endaliga avgjørt í samgonguni, so akkurát, hvussu stór skerjingin verður, ella, hvussu hon verður býtt sundur ímillum skipabólkarnar, er ikki heilt greitt enn.

### Ongar skerjingar annars

Eitt eru tær skerjingar, sum skulu til fyri at forða fyri, at veiðitrýstið økist í sambandi við at hvør fiskidagur nú skal býtast sundur í tímar.

Eitt annað er um naøkur verulig skerjing verður fyri at minkað veiðitrýstið, soleiðis sum fiskifrøðingar hava skotið upp.

Men tað verður tað neyvan og sostatt fer politiski myndugleikin heldur ikki í ár at taka tilmælið frá fiskifrøðingum til eftirtektar.

Hendrik Old sigur, at hann hevur skilt, at ætlanin er ikki at skerjaveiðitrýstið sum so og undir øllum umstøðum verður talan um ógvuliga avmarkaða skerjingar.

– Samgongan er samd um, at fiskidagatalið skal ikki broytast ov nógv frá ári til ár fyri ikki at geva vinnuni trupulleikar, tí ongin vinna kann liva við ov stórum sveiggjum í virkismøguleikunum og tí verða fiskidagarnir

### Føroya Banki skerjast

Somuleiðis er ætlanin at skerja fiskidagatalið á Føroya Banka. Fiskidagatalið á Føroya Banka varð skert 10 % í ár og Hendrik Old metir, at tað verður skert skert 10% afturat næsta.

Somuleiðis skal Bankin framhaldandi verða friðaður í gýtingartíðini.




*West Freezer er eitt av teimum umstríddu línuskipunum, sum endaði í útróðrarbólkinum, men nú skal hann aftur upp á pláss.*

# Nú skulu línuskipini uppá pláss

**Samgongan er samd um at línubátarnir, sum eru í útróðrarbólkinum, skulu nú flytast í bólkin fyri línuskip, har tey hoyra heima**

Skipabólkar
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu teystóru línuskipini, sum eru í bólkinum fyri útróðrarbátar, flytast yvir í línubólkin. Tað er samgongan samd um.

Hann sigur, at hetta er eitt mál, sum er nógv viðgjørt í samgonguni og tað er semja um at tað er neyðugt at broyta skipanina.

Seinastu árini hevur tað elvt til mikið stríð og stórar trupulleikar í vinnuni, at stórir línubátar hava verið í bólkinum fyri útóðrarbátar.

– Fyri arbeiðsfriðin í vinnuni er neyðugt at fáa hendan trupulleikan loystan.

Men nú er samgongan samd um, at tey stóru línuskipini, sum eru í útróðrarbólkinum, skulu flytast yvir í línubólkin, har tey av røttum hoyrir heima.

Hendrik Old sigur, at til hetta krevst lógarbroyting.

Hann veit ikki um hetta fer at verða lagt fyri løgtingið beinanvegin, saman við ásetingunum um fiskidagatalið, ella um tað bíðar til seinni.

Formaðurin í fiskidaganevndini sigur, at verða línubátarnir fluttir úr útróðrarbólkinum, yvir í línubólkin, verður neyðugt at flyta dagarnar hjá teimum við.

Sostatt verður neyðugt at broyta lógarásetta, vegleiðandi býtið av fiskidøgum, sum er ímillum bólkarnar og tí má lógin broytast.

Hann sigur, at fæst ein loysn á hesum trupulleikanum nú, slepst undan nógvum stríði, nú er tað ásett, at tað ber ikki til at "gera" smáar útróðrarbátar til stór línuskip.